VINNUSÍÐURNAR

OFFSHORE FAROES/2005
NORDIC HOUSE, TÓRSHAVN, 18 JANUARY

# Fjølbroytt og áhugaverd ráðstevna um olju og búskap og fisk

TÍÐINDASKRIV
*Vinnuhúsið*

Oljuráðstevnan Offshore Faroes 2005 verður hildin týsdagin 18. januar í Norðurlandahúsinum.

Lagt er upp til eina sera spennandi og fjølbroytta skrá, tá Oljuvinnufelagið fer at skipa fyri ráðstevnu í Norðurlandahúsinum í januar mánað.

Hesuferð hevur Oljuvinnufelagið valt at býta ráðstevnuna upp í tveir partar. Fyrri partur snýr seg um oljuleiting á føroyskum øki og seinni partur um, hvat skal til fyri at tryggja vælferð Føroya.

**Bjarni Djurholm**, landsstýrismaður í vinnumálum setir ráðstevnuna.

**Sigurð í Jákupsstovu**, stjóri í **Oljufyrisitingini** greiðir frá aðru loyvisrundu á føroyska økinum. Oljufyrisitingin fekk 9 umsóknir frá 8 feløgnum. Sigurð í Jákupsstovu fer at siga frá, hvørji oljufeløg fingu leitiloyvi, um arbeiðsskránna hjá teimum og hvørjar framtíðar vónirnar eru.

**Gregory T. Himes**, Vice President of Global Exploration frá **Statoil** fer síðani at greiða frá teirra áskoðan um framtíðar olju- og gass leiting. Gregory T. Himes hevur sagt, at úrslitið frá Rosebank/Lochnagar er sera týdningarmikið fyri arbeiðið hjá Statoil í hesum økinum. Hann vónar at fundið fer at hava við sær fleiri góð leitiúrslit bæði í bretskum og føroyskum øki.

Eisini **Dave Lewis**, Exploration Manager hjá **Chevron Texaco** fer at greiða frá hvørjar møguleikar tey síggja í Atlantsmótinum.

Statoil og Chevron Texaco hava júst kunngjørt at feløgini hava funnið eina stóra nøgd av olju og gassi í Rosebank/Lochnagar feltinum, har Chevron Texaco er fyristøðufelag og Statoil eigur 30%. Feltið liggur beint við føroyska markið. Bæði Statoil og Chevron Texaco hava søkt um leitiloyvi í aðru loyvisrundu í Føroyum.

**Føroya Kolvetni** var millum mest aktivu feløgini við seinastu loyvisrundu í Bretlandi. Eisini hevur felagið sókt um loyvi í aðru loyvisrundu í Føroyum. **Graham Stewart**, stjóri fer at greiða frá teirra virksemi í økinum.

Eisini fer **Wilhelm Petersen**, stjóri í **Atlantic Petroleum**, at gera status yvir teirra virksemi í Bretlandi.

Síðst í hesum parti fara **Petur Joensen**, deildarstjóri í **Oljufyrisitingini** og **Regin Hammer**, fyrisitari hjá FOÍB at greiða, hvussu pengarnir til førleikamenningina eru brúktir og hvat er komið burturúr.

Næsti partur av oljuráðstevnuni er ikki minni áhugaverður. Her verður spurt, hvussu tryggja vit vælferð Føroya í framtíðini?

Lagt verður út við íblástri frá øðrum londum. Fyrst fer **Thorvaldur Gylfason,** professari í búskapi við **Universitetið í Íslandi** at greiða frá, hvussu støðan er í Íslandi og hvat tey hava gjørt fyri at fáa búskapin minni tengdan at fiskivinnuni og harvið fingið eitt meira fjølbroytt vinnulív.

Somuleiðis fer **Torger Reve**, rektari og professari við **BI Handils-háskúlan í Stavanger** at tosa um at leggja ætlanir fyri vøkstur í einum samfelag, sum er so nógv merkt av einum tilfeingisbúskapi.

**Johnny í Grótinum**, cand. Polit, **Føroya Sparikassi**, fer síðani at tosa um vinnupolitik og búskaparvøkstur í Føroyum.

**Zvonko Mrdalo**, búskaparfrøðingur hjá **Hagstovu Føroya** fer at vísa á, at tað ikki er bara fiskur føroyingar útflyta, men eisini tænastur av ymiskum slag. Hetta vísur gjaldsjavnin hjá Føroyum, sum júst er gjørdur.

Síðsta framløga hevur **Ólavur Gregersen**, stjóri í **Bitland**. Hann fer at vísa á hvørjar forðingar hann sær í føroyska búskapinum fyri nýskapan. Hann fer eisini at koma við eini ætlan fyri, hvussu vit kunnu koma burtur frá hesi forðing.

Til síðst tekur **Magni Arge**, formaður í **Oljuvinnufelagnum** saman um.

Sí eisini www.industry.fo har millum annað skráin liggur.

**SÍÐSTA FREIST** at melda til er mánadagin 10. januar 2005 stendur í skrivi frá Oljuvinnufelagnum.

bp Anadarko GEYSIR PETROLEUM DONG HESS The Faroes Partnership

# Hong Kong framvegis fríast



**Sjey ár aftan á ta kinesisku yvirtøkuna av Hong Kong blómar býurin framvegis og bjóðar altjóða vinnulívi framúr lokkandi umstøður – og einki bendir á at kinesarar vilja broyta hetta**

VINNUUMHVØRVI
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Tíggjunda árið á rað útpeikar Heritage Foundation í sínari árligu kanning, Index of Economic Freedom, Hong Kong sum heimsins mest frælsa búskap.

Í 2004 útgávuni av Index of Economic Freedom framgongur at lønarskatta hámarkið í Hong Kong er 15,5 prosent, og tað einans á inntøkur í Hong Kong; fortjenastur uttan fyri Hong Kong verða, eins og vinningur av kapitali, ikki skattaðar. Skattur av vinnuligum avlopi hjá virkjum er 17,5 prosent og einki áramark er fyri hvussu nógv hall av vinnuligum virksemi kunnu flytast fram roknskaparliga.

Hong Kong er ikki nakað stórt pláss, bert 1098 ferkilometrar. Men búskapurin í býnum er sera opin, og eingin tollur er á innflutning av vørum og tænastum. Fyritøkur skrásettar í Hong Kong fáa somu sømdir uttan mun til uppruna. Ongar serligar skattligar sømdir verða givnar nøkrum, og ongar vinnugreinar eru politiskt vardar.

»Tá tú kemur til Hong Kong,« skrivar skattaráðgevingar heimasíðan OCRA.com, »veitst tú akkurát hvat tú fært: Lágir skattir á júst sama stigi sum øll onnur virkir í Hong Kong, eitt vinnuvinarligt umhvørvi, nýmótanst infrastruktur, og framúrskarandi vinnu møguleikar.«

## Grundlógar tryggjað

Men fer tað vinnuvinarliga umhvørvið í Hong Kong at vara við? Og hvat er tað sum býurin bjóðar altjóða vinnu?

Enn bendir so einki á at teir kinesisku myndugleikarnir, sum yvirtóku eftirlitið við tí fyrrverandi bretsku krúnkoloniini í 1997, hava nakrar ætlanir um at broyta stórvegis um tað vinnuliga umhvørvið í Hong Kong. Eisini eru hornasteinarnir undir skipanini niðurfeldir í ta serligu Hong Kong grundlógina, og haraftur kemur tann heilt serliga kappingar- og vinnumentanin sum tykist sita sera djúpt í fólkinum í Hong Kong.

Trygdarveitingar í Hong Kong grundlógini endurspegla avgerðir tiknar seint í 1970unum og tíðliga í 1980unum tá tann kinesiska leiðslan tók eina ógvuliga tilvitaða avgerð um at leggja lunnar undir hugtakið 'eitt land, tvær skipanir.' Grundlógin garanterar týdningarmiklar partar av Hong Kong mentanini og Hong Kong sum vinnumiðdepil, ikki minst: lóg og rættur og óheftir dómstólar; opin marknaður uttan toll á innflutning; lágskatta skipan við einføldum reglum og uttan skattskyldu til meginlands Kina; frítt konvertibult gjaldoyra; og frítt kunningar flow.

Fólk í Hong Kong halda fast um tað grundlógar tryggjaða vinnuvinarliga umhvørvið. Tey vita at hetta hevur verið við til at ført Hong Kong frá krígssorlaðum búskapi í 1945 til eitt blómandi samfelag av 7 milliónum fólkum ídag, við einari brutto tjóðar úrtøku per íbúgva oman fyri ta hjá nógvum londum har ímillum Stóra Bretland.

Virðisbræva marknaðurin í Hong Kong er tann næst størsti í Asia aftan á Tokyo, Japan, og er nógv meira dynamiskur og betur kendur millum íleggjarar enn flestu aðrir marknaðir í Asia. Fíggjarvinnan, millum heimsins størstu út frá ávísum mátum, er samstundis millum tær best reguleraðu. Hon er væl kend fyri høg stig av 'corporate governance', váðastýring og høg 'capital adequacy ratios' (capital adequacy ratios verða útroknað sum tann netto kapitalur ið krevst fyri at dekka átiknar uppgávur, ognir og kredittváðar í mun til búskaparligt avlop). Slíkir tættir gera Hong Kong til eitt hóskandi stað fyri útlendskan kapital til at møta tí stóra eftirspurninginum á íløgum í kinesiskt vinnulív.

Innan sjóvinnu og altjóða skipaskráseting er Hong Kong eisini at rokna millum leiðandi lond. Í hesum sambandi undirskrivaðu stjórnirnar í Hong Kong og Danmark nýliga eina dupultskatta avtalu galdandi fyri sjóvinnu.